# Løgfrøðingur til Skráseting Føroya

Søkt verður eftir løgfrøðingi til Skráseting Føroya at byrja 1. februar 2023 ella eftir nærri avtalu.

**Um starvið**
Skráseting Føroya umsitur lóggávuna um parta- og smápartafeløg, vinnurekandi grunnar, ársroknskapir, grannskoðarar, hvítvask o.a. Talan er um fast starv, sum í høvuðsheitum fevnir um umsiting og eftirlit innan málsøkið hjá Skráseting Føroya; at veita løgfrøðiliga ráðgeving og svara fyrispurningum; at luttaka í lógar- og kunngerðarsmíði og at avgreiða ymiskar umsitingarligar uppgávur.

Tú kemur at arbeiða í einum óformellum og dynamiskum arbeiðsumhvørvi, og tú fært eisini møguleika til, eftir tørvi, at loysa uppgávur fyri aðrar stovnar, ið Skráseting Føroya er skipað saman við.

**Førleikar**
Umsøkjari skal hava løgfrøðiligt kandidatprógv (cand.jur.).

Tú skal hava góð samstarvsevnir, vera ábyrgdarfull /-ur, røkin og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Tú skal duga at orða teg væl í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna fyrisiting, men ikki ein treyt.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Skráseting Føroya**
**Sigmundargøta 13**
**Postrúm 264**
**110 Tórshavn**

Ella sum teldupostur til: **sl@vs.fo**

Umsóknin skal vera merkt "Løgfrøðingur" og vera Skráseting Føroya í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. januar 2023.

Ynskir tú nærri upplýsingar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Súsonnu Leo, deildarleiðara, á tel. 356010 ella sl@vs.fo.

Nærri kunning um Skráseting Føroya sæst á www.skraseting.fo.

*Skráseting Føroya er fyrisitingarliga skipað undir Vinnustovninum. Vinnustovnurin er ein samanrenning millum Fjarskiftiseftirlitið, Posteftirlitið, Kappingareftirlitið, Tryggingareftirlitið, Útlendingastovuna og Skráseting Føroya. Eisini húsast Brúkaraumboðið og Dátueftirlitið í somu hølum.*